## Sangskrivaraverkstaður

Tólv sangskrivarar úr úr Danmark og Føroyum hava í døgunum 27. til 31. oktober eina sonevnda work-shop, har fokus verður sett á íblástur og samstarv. Tað er danska artist-felagið, sum stendur fyri verkstaðnum, er verður amerikanski troubadour'urin, Brett Perkins, vegleiðari á hesum. Føroysku luttakararnir á hesum verða Eivør Pálsdóttir, Guðrið Hansen, Eyðfinn Jensenn, Dánjal á Neystabø, Jóan Petur á Stongunum og Rannvá Jacobsen.

## Fólkatal í Suðuroy 1801 – 1911

Torgir Strøm úr Porkeri gevur nú út bóklingar við upplýsingum um fólkatalið í Suðuroynni. Torgir hevur áður givið "Fólk í Suðuroy 1584-1840", ið var tilfarum, sum Johan O. Damuelsen hevði savnað. Nýggja útgávan er grundað á fólkateljingar í Suðuroynni. Í fjør komu út fýra bøkur við fólkateljingum úr Sumba, Víkarbyrgi, Øgrum, Lopra, Vági, Porkeri, Nesi, Hov og Fámjin. Í ár verður talan um fýra bøkur afturat, og fevna hesar um Trongisvág, Tvøroyri, Sandvík, Fróðba, Øravík og Hvalba.

# 25 ár við einum skálkabrosi



*Leila Solmunde og Holger Kallehauge lýða á ein av fyrilestrunum*

**Meginfelag teirra brekaðu helt 25 ára føðingardag sín í Norðurlandahúsinum í gjár. Løgmaður setti tiltakið, Doris Hansen greiddi frá søguni, Jógvan Fríðriksson hugleiddi evni brekað og landsrættardómarin, Holger Kallehauge, greiddi frá viðurskiftum og rættindum hjá teim brekaðu í altjóða høpi**

**MBF**
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Tað var løgmaður, Jóannes Eidesgaard, sum setti føðingardagshaldið hjá Meginfelag teirra Brekaðu í gjár. 25 ár eru liðin síðani felagsskapurin fyri fyrstu ferð sá dagsins ljós, og í tí sambandi var skipað fyri einum stórum føðingardagshaldi í Norðurlandahúsinum, har fyrilestrar, tónleikur og okkurt til matna var á skránni.

Jóannes Eidesgaard vísti til søguna um miskunnsama samariubúgvan og segði, at tað ofta er ov langt frá hugsan til gerð.

– Virðini mugu býtast soleiðis, at øll fáa okkurt gott burtur úr, og støðan hevði verið munandi verri, um onki MBF, segði løgmaður í setanarrøðu síni.

### Skúlin ikki fyri øll

Doris Hansen hevur skrivað bókina "Søgan um hini", og greiddi frá søgu felagsins.

Hon vísti á, at tað eru tær ytru umstøðurnar, sum er avgerandi fyri, hvussu stórt brekið hjá tí einstaka er. Doris Hansen helt, at nógv er hent á økinum seinastu árini, men enn er langt eftir á mál vísti hon á.

– Sjálvt um vit hava eina lóg sum sigur, at skúlin er fyri øll, so er veruleikin ein annar, segði Doris, og seinni stuðlaði Leila Solmunde henni eisini í hesum, tá hon greiddi frá bóklinginum, sum verður útgivin nú, har tað kemur fram, at tað eru langt frá allir skúlar, sum eru atkomiligir hjá fólkum við breki.

– Eitt gott samfelag fyri brekað, er eitt gott samfelag fyri øll, vísti Doris Hansen á, at enda í røðu sínari.

### Breki og skeiva smíli

Í millum ymsu røðararnar var tónleikur, og áðrenn Jógvan Fríðsriksson fekk orðið, sluppu áhoyrararnir at leggja oyru til vælklingandi horntónleik við klaverfylgispæli afturvið.

Jógvan Fríðriksson ávaraði beinanvegin ímóti, at hansara fyrilestur ikki var fyri erkvisnar sálir. "Brek við einum skálkabrosi" kallaði hann hugleiðingar sínar, og tað var sanniliga við einum skálkabrosi at hann lýsti evni "brek".

Jógvan prestur greiddi frá, at vanliga virðingin fyri brekaðum í dag, er sum við eini pappeskju við gløsum í. Vit mugu vera øgiliga varin hvussu vit fara við eskjuni, tora ikki heilt at taka í og nerta við, sum vit annars høvdu gjørt, men tað mugu vit leggja av.

Jógvan Fríðriksson tosaði nógv um sjálvspei, og hvussu umráðandi tað var at hava henda eginleikan.

– Sjálvspei er frígerandi orka, og skálkabrosið tekur neiliga broddin av ymiskleika og fordómum, segði hann.

Í sama viðfangi vísti hann á, at tað helst hevði tænt øllum, um vit og MBF løgdu tað sjálvtignarliga á hillina, og Jógvan Fríðriksson minti á orðini hjá Møllehave um, at humor minkar um frástøðuna millum menniskju.

### Mugu vera sjónlig

Tá Jógvan Fríðriksson hevði fingið skálkabrosið fram á øllum áhoyrarunum, fekk Holger Kallehauge orðið. Holger Kallehauge er fyrrverandi landsrættardómari.

Hann bar heilsu frá DSI og DTU, sum eru felagsskapirnir hjá donskum brekaðum, og ynskti MBF hjartaliga tillukku við degnum.

Skemtandi segði hann, at tað ikki var hvørjum tilluтað fylla sama dag sum ST, men at tað gav høvi til at tosa um brekað í einum altjóða sjónarhorni.

Holger Kallehauge var minti á nøkur viðurskifti, ið gera seg galdandi hjá øllum brekaðum.



*Allir hesir vóru og lýddu á fyrrapart av tiltakinum, men eftir steðgin sum var, so hvurvu næstan allir av onkrari undarligari orsøk*